MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi til Mentamálaráðið

*Søkt verður eftir dugnaligum og ágrýtnum fulltrúa til fólkaskúlaøkið*

## *Starvið*

Eitt áhugavert og fjølbroytt starv á Stýrisdeildini sum fulltrúi innan fólkaskúlaøkið er leyst at søkja. Tann, ið settur verður, skal virka fyri, at játtanin verður nýtt so skynsamt sum til ber, menna virksemisstýringina og stýringaramboð annars innan økið. Fulltrúin verður partur av toyminum fyri fólkaskúlaøkið í Mentamálaráðnum.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a., at:

- Skipa og menna mannagongdir fyri virksemisstýringini, m.a. tímabýtið
- Útgreina arbeiðstíðarásetingar og verða við til at meta um skipanina
- Virka fyri, at stýringarskipanir sampakka væl við leiðsluuppgávuna í skúlunum
- Hava eftirlitið við, at skúlar umsita tímatillutanina á fullgóðan hátt
- Skipa hagtøl fyri virksemi í fólkaskúlanum.
- Veita skúlum ráðgeving og vegleiðing í umsitingarligum fyriskipanum innan starvsøkið
- Taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini hava verkætlanarleiðslu
- Røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum verða lagdar til fulltrúan

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum støði, og at arbeiðsgongdir eru í samsvari við galdandi reglur og settum málum Mentamálaráðsins.

## *Førleikakrøv*

Umsøkjarin skal:

- Hava viðkomandi útbúgving og royndir innan starvsøkið ella tað, sum kann sammetast við hetta.
- Hava innlit í arbeiðstíðaravtaluna hjá fólkaskúlalærarum og duga at greina arbeiðstíðina í virksemisætlanum, ella hava evni til skjótt at ogna sær henda førleika.
- Kunna samstarva, arbeiða sjálvstøðugt og í tvørgangandi verkætlanarbólkum og toymum.
- Vera tænastusinnaður og fyrikomandi
- Hava innlit í KT amboð innan stýring v.m.
- Kunna orða seg greitt í skrift og talu á góðum føroyskum máli
- Hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

## *Vit bjóða*

Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti við skúlar og skúlaleiðslur. Arbeiðið er á einum høgum fakligum støði, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Arbeiðið er í einum spennandi umhvørvi tætt saman við politiska myndugleikanum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

## *Setanar- og lønartreytir*

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Starvið verður lýst til setanar frá 1. januar 2015.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og Løgmansskrivstovuna.

## *Umsókn*

Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **10. november 2014, kl. 16.00**. Umsøkjarar, sum ynskja fleiri upplýsingar, kunnu ringja til Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 30 65 45 ella á 55 50 45.

***Mentamálaráðið** fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan - harundir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál og onnur trúarsamfeløg, loftmiðlar, upphavsrætt, ítrótt og annað frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað við Aðalskrivstovu, Politikkdeild, Stýrisdeild og Vitanardeild.*

***Stýrisdeildin** hevur sum aðalmál at tryggja eina skynsama gagnnýtslu av øllum tilfeingi innanfyri málsøki hjá Mentamálaráðnum. Deildin stendur fyri fíggjarlógararbeiðinum hjá grein 7, sum skal verða gjørt í tøttum samskifti við restina av ráðnum og undirliggjandi stovnum. Mál- og avriksstýring er eitt amboð í arbeiðinum at tryggja eina skynsama gagnnýtslu av tilfeinginum. Tillutan av tímum til fólkaskúlarnar og forskipanin til lønarkoyringar er partur av virkseminum á deildini.*